LØGTINGIÐ

Jógvan á Lakjuni, løgtingsformaður
her

Landsstýrismálanevndin

**08.11.2013**
**j. nr. 7.133-20130001[9] rs/td**
(at tilskila í svari)

**Viðvíkjandi handfaringini av málinum um undirsjóvartunnil undir Skálafjørð og Tangafjørð (skálafjarðartunnilin)**

Vísandi til stýrisskipanarlógina § 38, stk. 2 fer Landsstýrismálanevndin við hesum at heita á løgtingsformannin um at seta ein kanningarstjóra at kanna og gera eina frágreiðing til Løgtingið um ávikavist Kári P. Højgaard, fyrrverandi landsstýrismaður í innlendismálum, og Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður, hava fyrisitið málið um Skálafjarðartunnilin á lógligan hátt.

Kanningarstjórin verður serliga biðin um:

1. At kanna, um fyrrverandi landsstýrismaðurin í innlendismálum, Kári P. Højgaard, hevði nøktandi heimild til at samráðast og skriva undir møguligan sáttmála um bygging, fígging og rakstur av eini privatari tunnilsverkætlan í tíðini aftaná 1. august 2011.

2. At kanna, um fyrrverandi landsstýrismaðurin í innlendismálum, Kári P. Højgaard, hevur framt brot á § 5, stk. 2 í lóg um ábyrgd landsstýrisins, við ikki at kunna Løgtingið um eftirkanningar- og viðmerkingarskrivið frá embætisfólkum í Innlendismálaráðnum, dagfest 4. juli 2013, tá løgtingsmál nr. 3/2013 varð lagt fyri og viðgjørt í Løgtinginum.

3. At kanna, um fyrrverandi landsstýrismaðurin í innlendismálum, Kári P. Højgaard, hevur framt brot á § 5 í lóg um ábyrgd landsstýrisins, við at sýta fyri at útflýggja Løgtinginum sáttmálan millum Innlendismálaráðið og Copenhagen Infrastructure Partners, og í øðrum lagi ikki at geva løgtingslimum møguleika at fáa kunnleika til sáttmálan uttan at undirskriva trúnaðaravtalu.

4. At kanna, um fyrrverandi landsstýrismaðurin í innlendismálum, Kári P. Højgaard, hevur framt brot á § 5 í lóg um ábyrgd landsstýrisins í svari sínum upp á fyrispurning nr. 59/2012 eftir § 52a í tingskipanini, um privata avtalu við útlendskt felag um Skálafjarðartunnil; tá hann valdi ikki at brúka upplýsingarnar frá Landsverki, sum varð biðið um at svara fíggjarliga partinum av spurningunum.

5. At kanna, um fyrrverandi landsstýrismaðurin í innlendismálum, Kári P. Højgaard, er farin út um sínar heimildir við at undirskriva avtalu við Copenhagen Infrastructure Partners um at rinda 1 mió. kr. í sokallaðum “break fee”.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

6. At kanna, hvønn leiklut løgmaður hevur havt í málinum um Skálafjarðartunnilin, og um hann hevur framt brot á § 5, stk. 2 í lóg um ábyrgd landsstýrisins við at hava tagt ella givið Løgtinginum skeivar ella villleiðandi upplýsingar.

7. At kanna, um løgmaður hevur røkt sína eftirlitsskyldu sbrt. § 33, stk. 3 í stýrisskipanar-lógini ella hevur framt brot á lóggávuna, vísandi til punkt 1-5 omanfyri.

Nevndarinnar vegna

Sirið Stenberg
formaður